gult20 cyan20 magenta20 svart20

Danmarkarferð hjá Cantabile

Sunnudagin komu kórsangararnir úr Cantabile aftur úr Danmark, har tey hava verið á kórferð í eina viku. Cantabile vitjaði fyrst í Vejle, har kórleiðarin Pauli í Sandagerði er búsitandi. Kórið hevur síðani síðsta summar verið samansett av 12 sangarum og hava tey vant undir leiðslu av Benjamin Gaasedal, einum av teimum yngru kórlimunum, síðan Pauli flutti niður. Pauli hevur tó, við jøvnum millumbilum, vitjað her heima og vant við kórinum.

Cantabile hevði eina konsert í Vejle, í tí sokallaða Domus-salinum á Musikskúlanum. Eini 50 fólk høvdu leitað sær inn at lurta og varð konsertin væl fagnað. Eitt nú skrivaði Willy Stolarczyk, sum er ein av teimum navnframu tónaskøldunum og tónleikarunum í Danmark:

Cantabile må være et af Færøernes bedste kor. De sang et varieret program bestående af korsatser inspireret af færøsk folketone, de sang nationalromantik af Hugo Alfvén og Rachmaninoff, så var der jazzprægede og musicalprægede ballader, men også Henry Purcell mfl var på programmet, ikke at forglemme nyere ting som Vagn Holmboe, Sunleif Rasmussen og Pauli i Sandagerdi selv, som forøvrigt i mange år har været formand for Færøernes Komponistforbund. Koret sang fremragende. Det havde kvaliteter, som man ikke lige husker overgået i nyere tid. Det var rent, stærkt, udtryksfuldt, præcist, nuanceret og charmerende. Pauli dirigerede med fantasi og autoritet. Han lod ofte koret være lidt usikre på, hvilke direktionsmæssige improvisationer han kunne finde på i næste øjeblik - og dermed skabte han en stor opmærksomhed og en umiddelbarhed, som gav fortolkningerne et liv, som forplantede sig til publikum.

Eftir nakrar dagar í Vejle fór Cantabile víðari til Keypmannahavnar og hevði kórið eina konsert í Samuelskirkjuni á Nørrebro. Eisini her høvdu eini 50 fólk leitað sær inn at lurta í góðveðrinum og áhoyrarunum dámdu væl.

Síðsta punkt á skránni var luttøka á einari kórstevnu — Den Nordatlantiske korfestival, sum í ár varð fyriskipað av Húsakórinum í Keypmannahavn. Hetta varð 5 kórstevnan á rað, tann fyrsta var í 1997 í Århus, og hevur hon síðani verid uppá skift í teimum stóru býum í Danmark, har útisetakór halda til: Odense, Keypmannahavn og Ålborg.

Í ár vóru tað kórleiðarnir Sunleif Rasmussen og svenskarin Gunnar Eriksson, sum høvdu leiðsluna av teim báðum kórbólkunum. Sunleif Rasmussen hevði tann meira "klassiska" partin um hendi, meðan Gunnar Eriksson, sum eisini hevur verið í Føroyum fleiri ferðir, tók sær av tí "rytmiska" ella improviseraða partinum av kórstevnuni.

Húsakórid hevði bílagt eitt nýtt verk frá Trónda Bogasyni til kórstevnuna, sum varð frumframført í Frederiksberg Rådhus undir leiðslu av Gunnar Eriksson. Verkið, ið ber heitið "ðq", varð sungið á øllum teim trimum vestnordisku málunum; føroyskum, íslendskum og grønlendskum, umframt eina kvinnusolo, sum varð sungin á donskum.

Í ár varð fyrstu ferð, at eitt kór úr Føroyum luttók á kórstevnuni.

Høvi verður at hoyra Cantabile í summar, lýst verður nærri um nær og hvar. Cantabile er eitt sera virkið kór og til ber at kontakta Cantabile á cantabile@www.com

Cantabile ynskir at nýta høvi at takka sínum sponsorum sum gjørdu ferðina møguliga:

Tórshavnar býráð
Mentanargrunnur Landsinis
Agip Faroe Branch
Eimskip
Flogfelag Føroya
Og Sancy Seafood í Vág

At gevast at roykja

Grein 3 av 5: Fyribyrgingarráðið hevur fyrireikað eina røð av greinum í sambandi við tiltøk, sum verða Altjóða Tubbaksfría Dagin – 31. mai. Tey verða at síggja tær næstu tvær vikurnar og fevna um eitt úrval av tubbaks umrøðuevnum.

Hví er tað so ringt at gevast at roykja?

Eitrið, sum er í tubbaki, er ikki minni turvelvandi enn heroin og kokain. Tá ið tú roykir tubbak, kveikjast móttøðustøð í nervalagnum í heilanum. Tá ið móttøku-støðini ikki fáa nóg mikið av tubbakseitri, verður tú illa fyri. Kroppinum tørvar tubbakseitur bara til at føla seg vanligan.

Er vanligt, at tú merkir, at tú roynir at gevast?

Ja nógv ymisk merki hoyra vanliga til, tá ið tú roynir at gevast. Ikki øll føla tað sama, nøkrum fellir tað merkiliga lætt. Hjá øðrum stendur ikki so væl til í nakrar dagar.

Hvørji felagseyðkenni eru, og hvat fái eg gjørt, so eg megni tað?

Verður tú erkvisin – far ein gongutúr, far undir heitt brúsubað, anda djúpan, jagla tyggigummi við tubbakseitri í.

Verður tú eitt sindur í ørðviti – førka teg eitt sindur spakuligari, skift støðu spakiligari.

Fært tú ilt í høvdið – anda djúpan, fá tær eina aspirin.

Møðist tú – síggj til, at tú fært ein góðan svøvn, fá tær ein eykablund, royn og slepp tær undan trýsti, jagla tyggigummi við tubbakseitri í.

Kemur svøvnloysi á teg – fá tær einki kaffievni eftir klokkan 18.00, anda djúpan.

Fert tú at hosta – drekk nógv vatn, fá tær hostabomm ella kandissukur.

Fært tú ikki savnað tankarnar – royn at lætta um arbeiðsbyrðuna í nakrar dagar, slepp tær undan trýsti.

Broytist sodningin – drekk nógv vatn, et frukt og grønmeti saman við matinum, tú etur.

Følir tú svongd – drekk nógv vatn, hav munnbitar hjá tær, sum ikki eru fullir av kalorium og feitti.

Leingist tær eftir tubbaki – halt ímóti neyðini; neyðin fjarar burtur.

Hvussu leingi merkir tú, at tú nýliga ert givin?

Merkini eru bara fyri fyrst. Fyrstu tveir dagarnir eru vanliga teir ringastu. Tað er tíðin, tað tekur at skola tað mesta av tubbakseitrinum burtur úr kroppinum. Tær næstu tvær vikurnar siga roykjarar seg føla minni og minni.

Hvussu 'dragi' eg andan djúpan?

Set teg niður ella legg teg og royn at hvíla. Fá hugin at klárna. Fyll lungini spakuliga, meðan tú telur upp í 5, halt andanum, meðan tú telur upp í 3 til 5. Blás so spakuliga luftina út, meðan tú telur upp í 5. Ger hetta 5 ferðir umaftur. At draga andan djúpan fyllir blóðið við súrevni og hevur tað við sær, at blóðtrýstið lækkar. Roykjarar kunnu læra seg hetta sum partur av fyrireikingunum til at gevast. Tað er gott at duga hjá øllum, sum royna at sleppa undan trýsti.

gult21 cyan21 magenta21 svart21

Máralalærlingur

søkist.

Henning Sørensen
Tlf. 314788

Eykaaðalfundur

Lýst verður til eykaaðalfund í hølum felagsins mikudagin 30.05.2001 kl. 19.00. Dagsskrá sambært §8 stk. 1.

Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Tvingsilssøla

Hósdagin 14. juni 2001, kl. 9.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 462 k, Sandvík (AS nr. 19/2001).

Talan er um einisethús sambært tryggingarskjali stór halt umleið 100 m² í tveimum hæddum, sum eru gjørd av betong, klædd við timbri og takt við asbest. Harumframt er eitt úthús umleið 5 m².

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4375001), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fúturrættur

Keyp og søla av skipum

- Skipamekling
- Skipaumboðan
- Skiparaktur

Meira fæst at vita á:
Tlf. 318531 • Fax 319369

TOR SHIPPING

Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn

Norðstreymoyar Javnaðarfelag

Ársaðalfundur

kl. 20.00.

Skrá:

taka.

Nevndin

Valevnislisti

til skúlastýrisvalið 28. mai 2001
Skúlin við Ósánna

Í bókastavarøð eru valevnini hesi:

Margee Dam
Óla Jákup Dragaberg
Jørgin Ellingsgaard
Guðny Hammer
Jákup Pauli E. Jóhannesen
Óluva E. Klettskarð
Nichels Lützen
Jóna Olsen
Karin Olsen
Kári Sigurðsson
Jóhanna Vest

Valt verður í **Skúlanum við Ósánna** 28. mai 2001 frá kl. 14.00–20.00.

Vegna valnevndina
Símin P. Hjelm, form.

Aðalfundur 2001

Aðalfundur Havnar Fimleikafelags verður í hølini á Stórheyggi mikukvøldið 6. juni kl. 19.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

Havnar Fimleikafelag

Nýtt skeið til persónbil

Byrjar mánadag 28. mai kl. 17.00

Koyrikortið
Tórshavnar Ferðaskúli
Stoffalág 82

Góðir brúktir
Bilar á goymslu

1 VW Transporter T4 Diesel
Árg. 12.96
Koyrt 140.000 km.

AUTO-VIRKA

ADC-Heilsølan

ARBEIÐSHANDSKAR

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg